# Spariætlanir hjá Rósu Samuelsen eru hjartaleysar

**HØPISLEYS SPARING** Javnaðarflokkurin torpederar nú uppskotið hjá Rósu Samuelsen um at niðurleggja 33 pláss á sambýlum og á ellis- og røktarheimum kring landið og at flyta búfólkið aðrastaðir at búgva

Áki Bertholdsen

– Hetta er ein ætlan, sum er bæði hjartaleys og høpisleys.

Tað sigur Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin.

Javnaðarflokkurin ger nú greitt, at hann fer undir ongum umstøðum at taka undir við uppskotinum hjá Rósu Samuelsen um at niðurleggja yvir 30 pláss á sambýlum og ellis- og røktarheimum kring landið.

undir ongum umstøðum at góðtaka.

Hann sigur, at talan er um 33 pláss kring landið, sum landsstýriskvinnan í almannamálum hevur skotið upp at leggja niður.

Umframt tey 13 plássini, sum skulu niðurleggjast í Suðuroy, skulu eisini 13 pláss niðurleggjast í Eysturoy og restin í Vestmanna, og búfólkini flytast

### Bráðneyðugur tørvur

Hans Pauli Strøm minnir á, at

## Hetta er at bróta bæði penssjónsskipanina og álitið niður

HANS PAULI STRØM

Mánadagin avdúkaði Sosialurin, at fyri at spara pengar, hevur Rósa Samuelsen skotið upp at niðurleggja yvir 30 pláss ávísum sambýlum og ellis- og røktarheimum og at flyta búfólkið á tey fýra, nýggju ellis- og røktarheimini, sum nú verða bygd kring landið.

Síðani hevur Javnaðarflokkurin havt floksfund um ætlanina, har bæði løgtingslimir og landsstýrisfólkini vóru við.

Og Hans Pauli Strøm, framsøgumaður floksins í eldramálum, sigur, at niðurstøðan av fundinum er, at hetta fer Javnaðarflokkurin

í mars í fjør legði Rósa Samulsen uppskot fyri Løgtingið um at hækka studningslánini til røktarheim og sambýli.

– Tað var eftir eini politiskari raðfesting hjá samgonguni, at tað varð gjørt. Og tá sigur landsstýriskvinnan beinleiðis, at »tørvurin á búplássum er als ikki nøktaður, og sambært nýggjastu hagtølunum hjá Nærverki hava 132 bráfeingis tørv á búplássum«.

Framsøgumaður Javnaðarfloksins sigur, at hetta seinasta árið er støðan ikki batnað. Tvørtur ímóti ivast hann ikki í, at tørvurin er enn størri nú.

## Hetta er at lumpa pensjónistar

HANS PAULI STRØM

Hann minnir eisini á, at hetta var bara fyri at nøkta tann bráðneyðugi tørvurin og afturat honum kemur so tann tørvurin yvirhøvur.

– Nýggjasta uppskotið frá Rósu Samuelsen kunnu vit als ikki góðtaka, tí tað er stikk ímóti teimum politisku raðfestingum, samgongan annars er samd um.

– Hetta er burtur úr vón og viti og tað fer Rósa Samuelsen rætt og slætt ikki undirtøku fyri.

### Skal byggja meir

Hann skilir væl sjónarmiðið um, at tað er ikki nútíðarhóskandi, at eldri fólk búgva í tveymanskømurum.

– Men so skal Rósa Samuelsen ikki loysa trupulleikan við at niðurleggja pláss. So skal hon loysa trupulleikan við at útvega fleiri pláss í teimum økjum, har umstøðurnar hjá teimum eldru ikki eru nøktandi.

– Ein politisk raðfesting hjá samgonguni skal ikki skúgvast til viks av tí at Rósa Samuelsen nú brádliga skal seta nakrar sparingar í verk, tí hetta er ein sparing, sum skal yvirhaldast.

aki@sosialurin.fo



**BARBÁRÍ**

*– Uppskotið hjá Rósu Samuelsen um at niðurleggja 35 búpláss til eldri kring landið, er rætt og slætt barbarí, sigur Hans Pauli Strøm, talsmaður hjá Javnaðarflokkinum í eldramálum*

## *Rósa eigur at seta sessin í veð*

**Rósa Samuelsen hevur fingið ta játtan, hon hevur biðið um.**

**Tað staðfestir Hans Pauli Strøm talsmaður hjá Javnaðarflokkinum í eldramálum.**

**Rósa Samuelsen hevur annars sagt fyri Sosialinum, at samgongan hevur álagt henni ar spara 30 milliónir, men tað vísir Hans Pauli Strøm sostatt aftur.**

**Hann vísir sostatt eisini aftur, at tað er samgongan, sum hevur álagt Rósu Samuelsen at seta ávísar sparingar í verk á almannaøkinum.**

**– At hon síðani setir sparitiltøk í verk, er so ein raðfesting, sum hon hevur gjørt. Eins og hini landsstýrisfólkini, hevur Rósa Samuelsen sjálv ábyrgdina fyri tey uppskot, hon leggur fyri Løgtingið.**

**Og í summum førum hevur samgongan í tinginum tikið undir við tí og í øðrum førum ikki.**

**– Verður Rósa Samuelsen løgd undir trýst at seta sparingar í verk, hon ikki kann góðtaka, eigur hon at seta sítt starv sum landsstýriskvinna í veð og sýta fyri at seta tær í verk, sigur Hans Pauli Strøm.**

**– Eg finni meg ikki í, at landsstýriskvinnan javnan og savnan gevur allari samgonguni skyldini fyri tær sparingar, hon skjýtur upp, sigur talsmaðurin hjá Javnaðarflokkinum.**

**Men nú hava tit sjálvi í Javnaðarflokkinum atkvøtt fyri fleiri av hesum uppskotunum, tí kallar asosial, eitt nú at avmarka stuðulin til heilivág og at avtaka stuðulin til dagtilhald fyri at nevna tvey dømi?**

**– Ja, og vit renna ikki undan ábyrgdini. Men tað var alla tíðina ætlanin, at sparitiltøkini skuldu verða ein partur í eini heild, men restin kemur bara ongantíð. Eitt nú hevur tað verið upp á tal at inntøkuregulera ymsar veitingar, men tað kemur ikki so nógv burtur úr.**

**Hans Pauli Strøm sigur, landsstýriskvinnan í almannamálum fær ikki undir tøku frá javnaðarflokkinum til slíkan asosialan politikk longur.**

**– Vit hava lært av tí, sum er hent og nú vilja vit síggja eina heildarloysn, sum byggir á reformar, heldur enn á sparingr burturav, tí tað byggir onki upp, sigur hann.**

## HANS PAULI UPPHEVJAR SEG SJÁLVAN

Viðmerking frá Rósu Samuelsen á s. 26